# Vígdis slapp víðari til beinleiðis umførini

Føroyska dansikvinnan Vígdis Hentze Olsen dansaði seg hóskvøldið víðari í kappingini um at gerast besti dansari í Danmark, í sendingini Kan Du Danse? á donsku sjónvarpsrásini Kanal 5.

Í fimtu sendingini av Kan Du Danse? sóu vit seinasta dagin av dansiverkstaðnum, og teir sekstan luttakararnir, ið fara víðari til beinleiðis sendingarnar, ið byrja næstu viku skuldu finnast.

Aftur í dag kláraði Vígdis seg sera væl, og dómsnevndin var ikki í iva

– Vígdis tú ert ein fantastiskur dansari, tú fært alt at flóta saman í eina undurfulla eind. So sjálvandi er tú komin víðari, og tað gleða vit okkum at síggja, segði dómsnevndin.

Komandi hóskvøld er fyrsta beinleiðis sendingin, og tá skulu luttakararnir royna ein nýggjan dansistíl hvørja viku við nýggjum partnara. Her kunnu danir og føroyingar, ið síggja Kanal 5 fylgja við, hvussu tað gongst hjá Vígdis.

**nud**



*– Vígdis tú ert ein fantastiskur dansari, tú fært alt at flóta saman í eina undurfulla eind. So sjálvandi er tú komin víðari, og tað gleða vit okkum at síggja, segði dómsnevndin.*

## Suðuroyingar Í Havn

Leygardagin skipar ein 7. flokkur í Vági fyri áhugaverdum marknaðardegi í Losjuni í Havn, har tað er uppí eina bingju av lutum av øllum møguligum slagi at síggja. Har verður bæði nýtt og gott gamalt at fáa. Torgerð Suðuroy luttekur og er møguleiki at ogna sær nýtt og gamalt antikk, innbúgv, prýðis- og brúkslutir.

Flokkurin savnar pening til námsferð og tiltakið er opið frá klokkan 10 til 16.

## Fríðka spælipláss í Vági

**Leygardagin ætla sjálvboðin at fríðka spæliplássið í Lágabø**

SPÆL
*dagfinn@sosialurin.fo*

Leygarmorgunin klokkan 10 fara sjálvboðin undir at fríðka spælplássið í Lágabø í Vági. Stigtakararnir vóna, at so nógv sum møguligt taka undir við tiltakinum og geva eina hjálpandi hond. Ætlanin er, at spæliplássið aftur skal koma til heiður og æru, eftir at tað ongan góðan hevur havt eina tíð.

## Tónleikaríkt vikuskifti sunnanfjørðs

Í Suðuroynni nytist ongum at keða seg um vikuskiftið. Á Pubbini hjá Thomsen fara Neil, Hjalmar og Dagfinn at spæla fríggjakvøldið og leygarkvøldið. Kendi tvørabólkurin Revival fer á pall í TB-húsinum leygarkvøldið við sínum vælumtóktu pallframførslu og í Stóra Pakkhúsi í Vági skipar Trond Nolsøe fyri countrykvøldi leygarkvøldið.

## Veðrið um vikuskiftið

**Lýtt um vikuskiftið, kaldari í næstu viku.**

VEÐRIÐ
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Petur Skeel, veðurmaður, sigur at tað verður lýtt um vikuskiftið, mest ælaveður, men tó onkur sólglotti. Hitin fer at liggja millum 9 og 13 stig.

Mánadagin klárnar nakað upp og sum heild verður kaldari í næstu viku. Onkur sólglotti verður og hitin fer at liggja millum 5 og 9 stig.


FRIMÆRKER OG MØNTER SØGES!

Gratis vurdering i Tórshavn på Hotel Föroyar.
Onsdag d. 18. okt. kl. 15-19 samt torsdag d. 19. okt. kl. 13-14

Til vore kommende auktioner søges gl. breve til og fra Færøerne, gl. postkort, fragtbreve og alle former for frimærkesamlinger samt mønter, medaljer, pengesedler og øvrige gamle betalingsmidler.



Medbring Deres samlinger til en gratis og uforpligtende vurdering.

Vi køber også kontant!

Der vil ligeledes være mulighed for vurdering i Deres hjem efter forudgående aftale. Kontakt evt. vor lokale repræsentant Thorolf Björklund på tlf. 313631 for yderligere information eller vort kontor i Danmark.

THOMAS HØILAND AUKTIONER A/S
Muslingevej 40 · DK-8250 Egå
Tlf. +45 86129350 · +45 40324711 · +45 21272198
www.thauctions.com · e-mail: tr@thauctions.com